# TILTØK

**Vágs kirkja – leygardagin 21. mai**
kl. 16.00 hevur kirkjukórið úr Fríðrikskirkjuni konsert í Vágs kirkju. Á skránni verður eisini solosangur og klaverfylgispæl.

**Gudstænastur Trinitatis sunnudag**
***Havnar kirkja:*** kl. 11, Jóannis Fonsdal
***Kaldbak:*** kl. 12, Sonja Klein
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Heri Joensen. ***Talvan gongur fyri arbeiðið hjá Bíbliufelagnum í Føroyum***
***Argja kirkja:*** kl. 11, Bergur D. Joensen. ***Talvan gongur fyri arbeiðið hjá Bíbliufelagnum í Føroyum***
***Bøur:*** kl. 11 David Johannesen
***Haldarsvík:*** kl. 11,
***Tjørnuvík:*** kl. 12, Inga Poulsen Dam
***Glyvrar:*** kl. 11, Alfrida Kristiansdóttir Pedersen
***Rituvík:*** kl. 11, Meinhard Bjartalíð
***Eiði:*** kl. 11, messa, Verner Villensgaard
***Norðskála:*** John Myllhamar
***Sjóvar kirkja:*** kl. 11, altarg., Jógvan Fríðriksson
***Æðuvík:*** kl. 16, John Myllhamar
***Leirvík:*** kl. 11, altarg., Uni Næs
***Kunoy:*** kl. 12, altarg., Hans Eiler Hammer
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Niels Pauli Danielsen
***Viðareiðis kirkja:*** kl. 11, Elsa Funding
***Sandur:*** kl. 12, Jákup R. Hansen
***Tvøroyri:*** kl. 11 Jónsvein Bech. Kórið í Fríðrikskirkjuni syngur undir gudstænastuni
***Hvalba:*** kl. 12.30 Ólavur Rasmussen
***Fámjin:*** kl. 18 Jónsvein Bech
***Hov:*** kl. 12, altarg., Pastrick de Neergaard

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Bíbliugransking. Barnabíbliutími. Kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni, kl. 18 Møti í Missiónshúsinum v/Sigurd Sørensen.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting. Barnaansing verður eisini.
Mánakvøld kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Kl. 21.30 Bíbliugransking.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Kvinnustevna fríggjadag til sunnudag, major Grethe Olsen vitjar.
Sunnudag kl. 11 og 18 Møti, major Njál Djurhuus talar á báðum møtunum.
Sunnudagsskúli kl. 14.
Øll eru vælkomin.
www.frelsunarherurin.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 21. mai kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar. Sólrun Poulsen luttekur við vitnisburði.

**Frá Ebenezer**
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night.
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Samkoman Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, kl. 11.30 Samvera við drekka. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Z. um »Hin góða Hirðan«. Barnaansing undir møtinum. Sunnudagsskúlin kl. 12.
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti.
www.livdin.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Uppi á Brekku 3*
Fríggjadagin kl. 20 After Eight.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Malberg Olsen, Víkafólk syngja og vitna.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta við kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta við kommunión í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Orðsins tænasta við kommunión í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni og kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 verður eisini Møti, har John í Skemmuni talar.
www.hebron.fo

## Brúdleyp

Í samband við at Eyð í Funningsstovu og Gøran Melkersson, giftust í Nuuk 17. februar, halda vit brúdleypsgildið 28. mai í Starvsmannafelagnum. Opið hús frá kl. 19.00. Øll eru vælkomin.

Leygardagin 28. mai giftast í Rise Kirke, Hervør Skála, Tórshavn og Peter Mortensen, Rødekro. Veitslan verður í Sdr. Hostrup Kro. Heimaadr.: Hovedgaden 59 Hellevad, Rødekro.

Leygardagin 25. juni kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Margreth Olsen, Argir og Hildibrandur Olsen, Tórshavn. Veitslan verður í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 210755/210756 áðrenn 10. juni.

Leygardagin 2. juli giftast í Christianskirkjuni Dania Ragnarsson og Terji Poulsen, bæði úr Klaksvík. Døgurðin verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í Skálanum kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 319125/455950/275180 áðrenn 15. juni.

## Gullbrúdleyp

30. mai kunnu Margit og Rohn Rasmussen á Strondum halda gullbrúdleyp. Veitsla verður í Bygdrahúsinum á Strondum leygardagin 28. mai. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið, vinarliga ringið á tlf. 448641 ella 221646 áðrenn 23. mai.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

***Bøn***
*Góði Gud og faðir okkara. Takk fyri skaparverkið. Takk fyri at tú gevur tær far um hvørt einstakt menniskja. Takk fyri at tú gavst okkum son tín Jesus Kristus til frelsu frá syndum okkara. Styrk okkum í trúnni á náði tína. Halt tína signandi hond yvir landi og fólki okkara og verj okkum frá øllum illum. Verð hjá teimum, ið fingu tungar byrðar at bera, hjá teimum ið syrgja og sakna, hjá teimum, ið gráta yvir sítt miseydnaða lív. Hjálp okkum at liva henda dagin tær til æru og okkara medmenniskjum at gagni. Í Jesu navni.*
*Amen!*

2. grein í Ápóstólsku trúarjáttanini er um trúnna á Jesus. Fyrra helvtin ljóðar soleiðis:
Eg trúgvi á Jesus Krist, Guds einborna son váran harra, sum er gitin av Heilagum Anda, borðin í heim av Mariu moy, pínslaður undir Pontiusi Pilatusi, krossfestur, deyður og jarðaður, niðurfarin til heljar.
Í fornkirkjuni (Tað er í teimum fyrstu kristnu ættarliðunum) vóru, eins og nú á døgum, ymsar meiningar um Jesus. Menniskju vóru, ið settu vitanina í hásæti (eisini nevnd gnostikkarar). Hesi vildu eisini trúgva á Jesus, men trúu ikki at hann var sonur Guds, ella gitin av Heilagaum Anda, ella borin í heim av Mariu moy. Hesum kundu tey ikki trúgva, tí tað stríddi móti vitan teirra.
Eins og fólk tá á døgum høvdu ilt við at trúgva gleðiboðskapinum um Jesus Frelsaran, so eru eisini fólk í nútíðini, ið hava ilt við at trúgva øllum tí, ið Bíblian sigur um Jesus: Tað stríðir móti vitaninni í nú.
Vitanin er bundin at sansum okkara: Tað, sum vit kunnu máta viga ella merkja. Men við trúnni er øðrvísi. Hebrearabrævið 11. kap. lærir okkum soleiðis um trúnna: Trúgv er treyst í tí, sum vónað verður, sannføring um teir lutir, sum ikki eru at síggja.
Kristin trúgv er ikki vitan, men álit á tað, sum Gud við Heilagum Anda sínum opinberar fyri okkum úr Bíbliuni.
At eg trúgvi á Jesus Kirstus merkir, at játti meg sum syndara og Jesus sum mín frelsara, at eg seti álit mítt á bjarging hansara.
Tá ið Jesus var píndur og krossfestur; tá ið hann doyði, varð jarðaður og fór til heljar, tá varð tað fyri mína synd, ja fyri alla heimsins synd, tað hendi.
Trúgvin á Jesus Kristus rættvísgerð okkum, hóast at vit eru syndarar og gevur okkum kraft til tænastu, og vón um ævigt lív.
Jesus segði: Trúgvi á Gud og trúgvi á meg.

**Sverri Steinhólm**




Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 171 fólk á 16 privatkundadeildum og tveimum vinnukundadeildum kring um í landinum. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Á menningardeildini,Yviri við Strond 2, starvast átta fólk. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið INNI og Eik Bank.

## Nýhugsandi projektsamskipari við KT-førleika

Menningardeild okkara sóknast eftir einum projektsamskipara.

Projektsamskiparin gerst partur av einari stórari og spennandi fyritøku við hugsjónum og málum innan prosess- og produktmenning.

Vit síggja fyri okkum ein virknan og nýhugsandi samskipara, ið arbeiðir sjálvstøðugt við fleiri ymsum verkætlanum, har KT og fíggjarvirksemi eru snúðningsásurin.

Evnini at samstarva, arbeiða skjótt við nýggjum hugskotum og at eggja øðrum til eru týðandi, og leiðin frá góðum hugskotum til veruleika má vera stutt.

Uppgávurnar hjá samskiparanum eru m.a.:
· Integratión í samtaki Sparikassans
· Menning av nýggjum virksemi í fyritøkuni
· Menning av prosessum innan KT
· Samskifti við KT-veitarar

Menningardeildin mennir og røkir tøkniliga samskiftið, virkisgongdir og tænastur í tøttum samstarvi við stáps- og rakstrardeildir Sparikassans.

Nýggi projektsamskipari okkara eigur at hava hóskandi útbúgving og royndir innan KT og projektleiðslu, og analysuførleikar eru eisini neyðugir. Umsøkjarin skal vera sinnaður at menna seg bæði fakliga og persónliga.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:

Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari, á telefon 348510 ella við telduposti til: marjun.eystberg@sparikassin.fo

Annika M. Jacobsen, menningarleiðari, á telefon 348530 ella við telduposti til: annika.jacobsen@sparikassin.fo

Skrivlig umsókn skal verða Sparikassanum í hendi í seinasta lagi mikudagin tann 8. juni 2005.

Send umsóknina til:

FØROYA SPARIKASSI
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

VÁSTI 459010

FØROYA SPARIKASSI